## Eingin semja enn

Enn er einki komið burtur úr sáttmálasamráðingunum millum arbeiðsgevarafelagið hjá fíggingarstovnum og Finansforbundet um arbeiðs- og lønarviðurskiftini hjá teimum, sum arbeiða í Føroya Banka og hjá Trygd. Partarnir hava boðað hvør øðrum frá ávikavist verkfalli og verkbanni, og fæst eingin semja, lata Føroya Banki og Trygd ikki upp tann 21. mai. Partarnir tosa eisini um, hvønn teir skulu biðja royna at fáa semju í lag.

## Umrøða korallir

Í annaðkvøld, fríggjakvøldið, fer Pål Buhl Mortensen, doktari, at halda fyrilestur á Fiskirannsóknarstovuni í Nóatúni við heitinum „Nordens fantastiske koralrev - biologi og økologi". Í fyrilestrinum fer hann at greiða frá korallum, hvussu tey veksa, og hvørjum tey liva av. Harafturat fer hann at greiða frá, hvørji tiltøk okkara grannalond hava sett í verk fyri at verja síni korallir. Fyrilesturin, sum byrjar klokkan 19.30, er almennur.

# Foroya Banki uttan Ø

**Ø er ein trupul bókstavur at brúka altjóða, men henda trupulleika hevur Føroya Banki loyst við at gera Ø til O, soleiðis at bankin á altjóða pallinum eitur Foroya Banki. Tað kom fram, tá samleikaskiftið hjá Føroya Banka varð kunngjørt í morgun**




*Janus Petersen, forstjóri, greiddi frá samleikaskifti bankans, sum millum annað skal gera tað lættari á altjóða marknaðinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

BANKI
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroya Banki hevur fingið nýtt búmerki og nýggjan samleika. Seint í gjárkvøldið og í morgun varnaðust fólk kring landið, at gamli sjómaðurin við sydvest á høvdinum og róðrinum framman fyri sær, varð pilkaður niður og eitt nýtt búmerki varð hongt upp í staðin.

Eitt einfalt búmerki, svart við hvítari áskrift og navni bankans. Í morgun var boðið til tíðindafund hjá Føroya Banka í miðbýnum, har greitt varð frá nýggja búmerkinum og nýggja samleikanum.

### Ø ella O

Tað var Janus Petersen, forstjóri, sum greiddi frá broytingunum og orsøkunum aftanfyri, at sjómaðurin við sydvest nú mynstrar av. Sjómaðurin, sum hevur staðið á vakt hjá Sjóvinnubankanum síðani 1932, og so hjá Føroya Banka síðani 1994, tá Sjónvinnubankin og Føroya Banki løgdu saman, verður nú avloystur av einum munandi einfaldari búmerki.

– Gamli samleikin vísir til samanrenningina millum Føroya Banka og Sjóvinnubankan, meðan nýggi samleikin vísir betri tað, vit eru í dag, staðfesti Janus Petersen og vísti til tørvin á samleikaskiftinum, nú bankin skal einskiljast og skrásetast á virðisbrævamarknaðinum.

Og júst tí, at Føroya Banki í næstum fer undir uttanlandavirksemi, hevur verið neyðugt við ávísum broytingum ella tillagingum á búmerkja- og navnasíðuni.

– Tað er bara fólk í norðurlondum, sum kenna til Ø, og tey fara framvegis at síggja henda bókstav í nýggja búmerkinum. Men hjá øðrum fólkum fer bókstavurin at líkjast einum O, soleiðis at bankin fer at eita Foroya Banki á altjóða pallinum, greiddi Janus Petersen..

### Nýggja heimasíðu

Í samband við samleikaskiftið, hevur bankin fingið nýggja heimasíðu, www.foroya.fo. Eina heimasíðu sum sambært bankanum er greiðari og meiri upplýsandi enn tann gamla, og sum er bygd upp um tey trý høvuðsvirkisøkini hjá bankanum: vinnu-, privat- og íløguvirksemi. Afturat tí er so ein partur, sum er ætlaður komandi partaeigarum, fjølmiðlum og øðrum.

Føroya Banki hevur gjørt nógv burtur úr nýggja samleikaskiftinum, og hetta fer brúkarin eisini at merkja komandi dagarnar í lýsingarátaki bankans.

*Ø er ein trupul bókstavur at brúka altjóða, men henda trupulleika hevur bankin loyst við at gera Ø til O, soleiðis at bankin á altjóða pallinum eitur Foroya Banki, meðan hann millum føroyingar framvegis eitur Føroya Banki*

HØLIR YNSKJAST!

Vegna ein klient, sum ætlar at byrja virksemi í Havn, verður søkt eftir hóskandi handilshølum til støddar 2-300 m² og við góðum atkomu- og parkeringsviðurskiftum.

Áhugaði kunnu venda sær til
Jógvan Páll Lassen, adv. ella
Tórunn D. Lassen, skrivara
e-mail: tdl@lawfirm.fo

ADVOKATFELAGIÐ VIÐ STROND 4
YVIRI VIÐ STROND 4 · TEL 311260 · FAX 311261 · P.O. BOX 359
FO-110 TÓRSHAVN · FAROE ISLANDS
EMAIL: LAWFIRM@LAWFIRM.FO
HEIMASÍÐA: WWW.LAWFIRM.FO

TÓRMÓÐUR DJURHUUS · JÓGVAN PÁLL LASSEN · PETUR EVEN DJURHUUS
JÓGVAN E. ELLEFSEN · ANNA DAM · INGI HØJGAARD · JÓHAN J. LAMHAUGE
GUNN ELLEFSEN · MIMI STEINTÓRSDÓTTIR